# Innrás í Vágum

**Tað vóru so nógvir bilar, sum helst ongantíð fyrr hava verið ein dag, í Vágum, eftir at Vágatunnilin lat upp týsdagin. Handlar og fyritøkur í Vágum høvdu nógva vitjan**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Bilar í túsundtali vóru í Vágum týsdagin, eftir at Vágatunnilin var latin upp*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vágar:** Tað var rættiligt trýst á veganetinum í Vágum, eftir at latið var upp undir Vestmannasundi týsdagin. Bilar í helst túsundtali koyrdu gjøgnum bygdirnar.

Tað vóru sjálvandi nógv tiltøk í oynni hendan dagin, og nógv fólk ymsastaðni úr landinum nýtti hetta høvið at koyra gjøgnum tunnilin, nú einki skuldi gjaldast fyri tað. Sama lagið var mikudagin.

Frá tí, latið varð upp um hálvgum fýratíðina seinnapartin og til langt út á kvøldið slitnaði røðin av bilum, sum koyrdi fram við vindeyganum hjá Vágaredaktiónini hjá Sosialinum í Sandavági, ongantíð sundur.

Á skrivstovuni hjá Vágatunlinum var tó ikki gjørt upp, tá vit høvdu samband við tey, áðrenn blaðið fór til prentingar, hvussu nógvir bilar vóru farnir gjøgnum tunnilin fyrsta dagin, opið var.

Í Vágum merktu handlar og fyritøkur eisini, at latið var upp. Eitt nú segði bakarin í Sandavági, at tað tyktist, sum fólk vóru svong hinumegin Sundið, tí tey komu til Sandavágs at keypa bakstur. Tá kvøldið kom, var handilin dustsog-in, sum tikið veðru til. Ikki ein bolli var eftir, segði hann.

Á Hotel Vágum var fult. Í orðsins rætta týdningi. So fult, at tað fleyt yvir. Soleiðis at skilja, at fólk mátti bíða eftir borði, siga tey av hotellinum.

Hotel Vágar hevði sonevnt buffet, og fólk, sum komu av oynni, hildu tað vera eitt gott hugskot, siga tey av hotellinum, tí tey stóðu nógv og bíðaðu eftir borði.

Seinni var eisini dansur á hotellinum, og nógv fólk var í dansi. Eisini hevur væl av fólki gist á hotellinum fyrstu náttina eftir, at tunnilin lat upp.

Aftur mikukvøldið skuldi buffet vera á Hotel Vágum, og nógv fólk hevði bílagt sær borð frammanundan, varð sagt.

Hotel Vágar hevur annars væl at gera nú upp undir jól. Vanligu jólaborðhaldini eru fleiri, og nógv verður eisini latið út úr húsinum.

Týskvøldið stóð Hotel Vágar fyri allari matgerð og servering, tá partafelagið Vágatunnilin hevði veitslu fyri 400 fólkum í ítróttarhøllini á Giljanesi.

# Alarm-centralurin virkar væl

**Tað er ikki rætt, tá sagt verður, at alarmcentralurin ikki virkar, sigur varapolitikommiserurin í Havn. Trupulleikar hava hinvegin verið við eini tilkalliskipan til sløkkiliðini**

TILKALLING
*Edvard Joensen*



*Alarmcentraluirn er púra tryggur at brúka, um vanlukka hendir. Hinvegin eru trupulleikar við eini tilkalliskipan, sum skal fáa boð út aftur frá politistøðini til sløkkiliðsmenninar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Alarmcentralurin er púra tryggur, og fólk hava onga grund til at óttast, at hann ikki riggar, tá brúk er fyri honum, sigur Jón Klein Olsen, varapolitikommiserur.

Í samrøðu við sløkkiliðsleiðaran í Miðvági- Sandavági í týsdagsblaðnum skrivaðu vit, at alarmcentralurin ikki riggaði, tá venjing var í undirsjóvartunlinum sunnukvøldið.

Har er bland komið í hugtøkini, vísir Jón Klein Olsen á. Talan er ikki um alarmcentralin, men um eina tilkalliskipan, sum nýtt verður á politistøðini at kalla sløkkiliðsmenninar til arbeiðis við.

Tað er soleiðis, sigur Jón Klein Olsen, at alarmcentralinum fæst fatur á við at ringja 112. Hin skipanin, sum ikki virkar optimalt, við gongur hann, er ein skipan, har ringt verður út aftur, eftir at alarmcentralurin hevur fingið boð.

Hann ásannar, at trupulleikar hava verið við hesi skipanini, og at arbeitt verður við at loysa teir. Fólk frá Føroya Tele hava gjørt, og gera framvegis, stórarbeiði fyri at finna fram til, hvat tað er, sum er galið.

At hjálpa sær hava teir heitt á sløkkiliðsmenninar um at ringja til eitt ávíst nummar hjá Føroya Tele, fyri á tann hátt at lokalisera eina møguliga linju, sum svíkur.

– Men eg má ásanna, sigur Jón Klein Olsen, at ikki allir sløkkiliðsmenn taka tað í nóg stórum álvara. Tí eftir venjingina sunnukvøldið varð aftur heitt á sløkkiliðsmenninar um at ringja og kanna eftir, hvussu til stóð. Men tað vóru bara tríggir, sum ringdu mánadagin, sigur hann.

Tað áliggur annars sløkkiliðunum eftir grein 12 í brunalógini at hava slíka skipan, men bara Tórshavnar- og Klaksvíkar Kommunan hava gjørt hesa skipan til síni sløkkilið, sigur Jón Klein Olsen.

# ítróttur

Nr. 239 • hósdagur • 12. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Helen á Lakjuni í danska endaspælinum

**Fyrrverandi ÍF spælarin roynir seg á fyrsta sinni í bestu donsku deildini, har hon heldur støðið vera eitt sindur hægri enn í Føroyum, men hon heldur ikki, at munurin er so stórur millum venjingarnar í Fuglafirði og á Frederiksberg**

ÚTISETA FLOGBÓLTUR
*Jóannes Hansen*


*Fyrrverandi ÍF-leikarin, Helen á Lakjuni, roynir seg nú í donskum flogbólti, og saman við liðfeløgunum úr Frederiksberg er hon nú komin í endaspælið*

Onkuntíð hava fleiri kvinnuligir flogbóltsspælarar verið í bestu donsku deildini, sum verður nevnd elitudeildin, men nú eru tær ikki nógvar. Tá ið tað eftir ársskiftið verður farið undir endaspælið í elitudeildini, verður tað bara ein kvinnuligur føroyskur flogbóltsspælari millum luttakararnar.

Talan er um Helen á Lakjuni Jacobsen. Sunnudagin var hon á liðnum hjá Frederiksberg, sum í síðsta umfarinum í grundspælinum tryggjaði sær fimta og seinasta plássið í endaspælinum. Dysturin var rættuliga tættur og spennandi ímóti Aabyhøj. Tað er felagið, sum Juanna S. Joensen spælir við, men hon var ikki á liðnum sunnudagin.

Frederiksberg vann 3–2, og settúrslitini vóru 23–25, 25–20, 25–17, 16–25 og 15–9. Frederiksberg vann fýra av níggju dystum í grundspælinum, og tær høvdu saman við Fortuna átta stig. Settmunurin hjá Frederiksberg var eitt betri, enn hann var hjá Fortuna, sum tískil var akkurát ov stutt at sleppa upp í part í endaspælinum.

Tað verður farið undir endaspælið eina ferð eftir ársskiftið. Saman við Frederiksberg eru fýra onnur feløg við í telvingini um DM. Tey eru Holte, AIK Aalborg, Rosenlund og DHG Odense.

## Gamlir kenningar

Sunnukvøldið vísti DR1 ítrótturin brot úr síðsta dystinum hjá Frederiksberg í grundspælinum. Tá var Helen á Lakjuni Jacobsen at síggja mitt fyri netinum. Tá ið vit týsdagin fingu fatur á henni, hevði hon frí frá venjing.

– Vit venja fýra ferðir um vikuna. Vit venja mánadag, mikudag, hósdag og leygarmorgun. Vit venja í trimum ymiskum hallum á Frederiksberg. Tvær ferðir um vikuna venja við í Büllowsvejhøllini, og tað er har, at vit spæla heimadystirnar, sigur Helen á Lakjuni Jacobsen. Hon er í útbúgvingarørindum í Keypmannahavn. Hon lærir til politist, og tá ið við tosaðu við hana, var hon júst komin til hús, eftir at hon og hini, sum ganga í politistaskúlanum, høvdu hjálpt til við nógva vaktarhaldinum, sum er í Keypmannahavn í hesi vikuni, nú tað er ES toppfundur í danska høvuðsstaðnum.

Hvussu ber tað til, at tú valdi júst at spæla við Frederiksberg?

– Tá ið eg kom til Keypmannahavnar í summar, vildi eg fegin royna meg sum flogbóltsspælari. Eg hevði samband við Alvildu Ólavsdóttir. Hon, Hjørdis Mortensen og Annika Joensen hava spælt við Frederiksberg. Tær leggja ikki so nógv í venjingina longur, men spæla í lægru deildunum. Alvilda spurdi fyri meg, um tað bar til at venja við. Tað var beinanvegin í lagi, og síðani havi eg verið á liðnum í elitudeildini. Í fyrstu dystunum var eg eitt sindur uttanfyri, men nógvu tær seinastu ferðirnar havi eg spælt so at siga alla tíðina.

Eru tit nógvar, sum kappast um plássini?

– Vit eru trettan, sum hoyra til liðið. Ein av hinum hevur verið skadd mesta partin av tíðini, síðani eg kom í felagið. Viðhvørt eru opnar venjingar, har tær, sum hava hug at royna seg fyri at sleppa upp í part, hava møguleika at royna seg. Men tað er ikki skift út á besta liðnum, síðani eg kom á liðið, sigur Helen á Lakjuni Jacobsen.

## Eitt sindur hægri støði

Fyri tað mesta hevur Helen spælt flogbólt við ÍF. Tá ið vit spyrja hana, um støðið, sum hon nú kappast á, er hægri, enn tað er í bestu deildini í Føroyum, so svarar hon soleiðis:

– Tað gongur eitt sindur skjótari, og bóltførleikin er eitt sindur betri, enn hann er í føroysku kappingini. Vit venja fýra ferðir um vikuna, og vit venja tveir tímar hvørja ferð. Tað er full ferð á alla tíðina, og tað er undantakið, at onkur ikki møtir upp. Í Fuglafirði vandu vit tríggjar ferðir um vikuna, og vit vandu hálvan annan tíma hvørja ferð. Men eg haldi ikki, at venjingin er nakað serligt betri, enn hon var í ÍF í fjør. Tá høvdu vit Boban til venjara, og hann var og er ein sera góður venjari.

Helen er miðspælari. Hennara lutur er at blokera álopsroyndirnar hjá mótstøðuliðnum, og so er hon við í álopsspælinum eisini. Hon vil ikki siga nakað um sínar egnu dygdir. Men á heimasíðuni hjá flogbóltsfelagnum á Frederiksberg verður hon saman við hinum miðspælaranum søgd at vera trygdin fyri hårde smash og listige lobs!

## Oyggjaleikirnir

Helen var við landsliðnum á oyggjaleikunum fyri hálvum øðrum ári síðani. Tá ið við spyrja hana, um hon ætlar sær at vera á landsliðnum, sum komandi summar fer á oyggjaleikirnar, so svarar hon soleiðis:

– Eg havi ikki hoyrt so nógv um landsliðið. Fyri stuttum fekk eg teldupost frá Niclasi Joensen, venjaranum. Hann fregnaðist um flogbóltspælið hjá mær. Um eg verði úttikin til landsliðið, so vil eg fegin vera við, um tað ber til. Eg veit ikki enn, hvussu tað verður við summarfrí frá útbúgvingini, men eg vil fegin vera við á oyggjaleikalandsliðnum, sigur Helen á Lakjuni Jacobsen. Hon er 25 ára gomul og liggur um miðalaldurin á liðnum hjá Frederiksberg. Yngsti spælarin er átjan ára gomul, og tann elsta er 32 ára gomul.